# Vegleiðing

## viðvíkjandi tilmelding til skúla

Í galdandi kunngerð um lærusáttmála er ásett, at tá ið læupláss hevur móttikið góðkendan lærusáttmálan frá Yrkisdeplinum, skal læruplássið innskriva lærlingin til góðkendan yrkisskúla.

Sambært hesum er tað tygara skylda – so skjótt tygum hava móttikið góðkendan lærusáttmála frá Yrkisdeplinum og í góðari tíð áðrenn lærlingurin skal í skúla fyrstu ferð – at tilmelda lærlingin til tann skúla, tygum og lærlingurin hava valt.

Saman við tilmeldingablaðnum skulu tygum eisini senda skúlanum avrit av tí góðkenda lærusáttmálanum. Er talan um læru innan handverk og tøkni og lærlingurin skal í skúla í Danmark, skal avrit av skúlatilmeldingini og avrit av lærusáttmálanum eisini sendast til avvarðandi yrkisnevnd.

***Soleiðis gera tygum:***

At velja skúla: Tað finnast 2 skúlayvirlit – annað viðvíkjandi skúlum innan handils- og skrivstovuyrkið og hitt viðvíkjandi skúlum innan handverk og tøkni. Viðhvørt er einki skúlaval, meðan tað í øðrum førum eru 2 ella 3 skúlar at velja í millum. Vel ein teirra. Viðvíkjandi skúlanum tygum og lærlingurin hava valt, er upplýst um bústað og telefon og viðhvørt eisini teldupostadressa.

At útfylla tilmeldingarblaðið: Tygum skulu útfylla alt oyðublaðið – eisini dato og undirskrift. Vinarliga nýt annaðhvørt skrivimaskinu ella skriva við blokkbókstavum.

At senda til skúlan: Tá tygum hava útfylt tilmeldingarblaðið, senda tygum tað til tann skúlan, tygum og lærlingurin hava valt. Minst til, at skúlin skal eisini hava avrit av tí góðkenda lærusáttmálanum. Tygum síggja adressuna hjá skúlanum í skúlayvirlitinum.

At senda til avvarðandi yrkisnevnd: Er talan um læru innan handverk og tøkni og lærlingurin skal í skúla í Danmark, skal avrit av skúlatilmeldingini eisini sendast til avvarðandi yrkisnevnd saman við einum avriti av lærusáttmálanum. Tygum síggja adressuna hjá yrkisnevndini í skúlayvirlitinum.

Upplýsing um t.d. skúla (hvar hann liggur, bústað v.m.), um skúlaskeið, um innihald í útbúgvingunum og nógv annað kann m.a. annað lesast á hesum heimasíðum:

| | |
|---|---|
| Føroysku skúlarnir: | Tekniski skúlin í Tórshavn (www.tst.fo)<br>Tekniski skúlin í Klaksvík (www.tsk.fo)<br>Føroya Handilsskúla í Tórshavn og á Kambsdali (www.fh.fo)<br>Fiskivinnuskúlin í Vestmanna (www.fiskvest.fo) |
| Donsku skúlarnir: | Til dømis: www.elevplan.dk. ella www.ug.dk. |

--------------